# B&O í bilin

Danska Bang & Olufsen hevur leingi verið ein av hægst virdu framleiðarunum av ljóðútgerð til heimið. Fyri stuttum hevur fyritøkan í Struer víðkað um virkisøkið, sum nú eisini skal fevna um ljóðútgerð til bilar. Samstarv er longu gjørt við AUDI, har topp-modellini hjá fyritøkuni nú fáast við B&O útgerð, og roknað verður við, at enn eitt samstarv verður avdúkað á bilamessu, sum hósdagin verður sett í Fraklandi. Kostnaðurin fyri eitt B&O anlegg í bilinum liggur um 45.000 kr.



# Lønarútgjaldingar

Av samlaðu lønarútgjaldingunum í Føroyum upp á 6,1 mia kr. í 2005, vórðu 36% goldin til konufólk. Av inntøkuni hjá konufólkunum stavaðu 57% frá almennari fyrisiting og tænastu.

*kelda: www.hagstova.fo*

# ri





*Á FaroeJet veksur ferðafólkatalið støðugt, og so seint sum farna vikuskiftið var fullsett bæði til og frá Danmark*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

leggur seg eitt sindur aftur á í stólinum og hugsar eina løtu, áðrenn hann svarar.

- Vita fólk ikki hetta, so hava vit ikki marknaðarført okkum nóg gott. Men tað fáa vit so altíð gjørt okkurt við.

Ein annar trupulleiki, sum FaroeJet og kundar teirra hava havt, er bókingarskipanin, FaroeJet nýtti at byrja við. Henda bókingarskipanin er nú skift út við Amadeus-skipanina, sum næstan øll flogfeløg brúka í dag, og sum er lættari og betri fyri kundan.

### Átalaðu SAS

Jóhan E. Simonsen sigur allatíðina, at høga tænastan er nakað tey seta í hásæti á FaroeJet, men hann viðgongur tó, at tað hevur verið onkur svipsari.

- Vit hava, sum øll onnur, ikki altíð klára at gjørt tað, vit ætlaðu. Serliga tann eina sunnudagin í september mánaði gekk galið. Vit sluppu ikki aftur úr Frankaríki til tíðina at flyta okkara ferðafólk úr Danmark heim til Føroya. Tað er ikki nóg gott, og í Kastrup fingu tey, sum bíðaðu, heldur ta service, sum okkara samstarvsfelagið í SAS skal syrgja fyri at tey fáa, og tað eru vit ógvuliga hørm um.

- Tíbetur ringdu nógv fólk til okkum tá, og gjørdu vart við sína ónøgd, og vit fingu forklára okkum. Og so skal leggjast aftrat, at samstarvsfelagin í SAS fekk eina alvorliga átalu fyri tað, sigur Jóhan E. Simonsen.

### Bólturin rullar skjótari

FaroeJet er hevur nú verið í luftini í fimm mánaðir. Tað var ógvuliga tungt at koma í gongd, men nú rullar bólturin skjótari og skjótari ásannar Jóhan E. Simonsen.

- FaroeJet varð stovnað 20. desember í 2005 og vit flugu longu 15. mai í ár. Tað er óvanligt at flúgva so skjótt aftan á, og tað vóru eisini tey, sum øtaðust, tá vit greiddu frá um ætlanir okkara. Men nú siga tey, at tað er flott av okkum.

Men hetta er sjálvandi ikki komið av sær sjálvum, og sambært Jóhan E. Simonsen er høvuðsorsøkin at tað bar til so skjótt, at teirra starvsfólk hevur so nógvar royndir frá vinnuni áðrenn.

- Starvsfólkið brennur fyri FaroeJet, og tað hevur gjørt tað gjørligt hjá okkum, staðfestir stjórin.

### Besta vøran og lægri prís

Tað gongur fram á hjá FaroeJet. Ferðafólkatalið svingar sjálvandi frá túri til túr, men í miðal fyri hvønn mánað veksur ferðafólkatalið støðugt. Eisini havi tey fleiri fullsett flogfør, og so seint sum farna vikuskifti var útselt, bæði niður til Danmarkar og heim til Føroya.

- Eg havi sagt tað fyrr, og eg kann endurtaka meg sjálvan. Vit eru komnir fyri at vera, og vit hava longu nú syrgt fyri, at broytingar er gjørdar.

- Síðani vit eru komnir á marknaðin er bíligasti einvegis ferðaseðilin til føroyingar farin úr 2295 krónur niður á 695 krónur. Eisini er tænastan ferðafólkini fáa hækkað munandi, og avsláttarskipanirnar eru somueliðis bøttar.

- Tað er ein royndur lutur, at kapping er til fyrimuns fyri brúkaran og tí er tað, at eg sigi, at FaroeJet tryggjar, at kundin fær ta bestu vøruna til tann besta prísin, sigur hann og tømir koppin við kaffi í.




*- Starvsfólkið brennur fyri FaroeJet, og tað hevur gjørt tað gjørligt hjá okkum at koma so gott í gongd og hava eina so høga tænastu, sigur Jóhan E. Simonsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Vitreisa okkum frá borðinum og takka spakuliga fyri okkum, men áðrenn vit fara spyrji eg Jóhan E. Simonsen, hvat liggur fyri framman hjá FaroeJet. Hann svarar og sigur, at teir fara at koyra á á sama hátt, men leggur hann aftrat, at teir eisini arbeiða við fleiri spennandi tingum.

- Eg kann ikki koma nærri inn á hvat tað er, men tað inniber millum annað at gerast sjónligari í Danmark, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri í FaroeJet.